# Serligur suppuborðiskur

MILLUM STØRSTU **MENTANARUPPLIVINGARNAR** Í EINUM **FREMMANDUM** LANDI, ERU OFTA **MATUPPLIVINGARNAR**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Heri Simonsen, heris@sosialurin.fo



Føroyskt ferðalag við 31 fólkum var fyri stuttum í Póllandi, har mong nýttu høvið at fara til tannlækna og optikara. Men tíð var eisini til ymiskt annað.

Føroyingar eru óivað millum fremstu »shopoholikarar« í heiminum, og tað var títt millum handilsvitjaninar hjá teimum, ið vóru í tí føroyska ferðalagnum, sum fóru til Póllands við Lailu og Óla Jákup Rólantsson.

Millum serligu upplivingarnar var at eta eina væl kryddraða og sterka pólska jekarasuppu – ella veiðumanssúpan um ein vil. Talan er um ein ógvuliga serligan pólskan matarrætt. Góður matur er altíð ein uppliving í sær sjálvum, og var nógv gott kjøt, leykur o.a. í veiðumanssúpanini, sum vit fingu á matstovuni í Stettin.

## Borðiskur av breyði

Men tað sum gjørdi upplivingini øðrvísi og forkunnugu, var at suppuborðiskurin var gjørdur av breyði, og tað var lokið eisini. Talan var um breyð við einari sera sterkari skorpu.

Tann serligi borðiskurin var nú meira at líkna við eina lítla supputerin, har lokið eisini var gjørt av breyði, og so var meiningin, at ein skuldi eta lokið meðan ein seyp ta frálíka góðu pólsku veiðumanssúpanina.

Fólk gjørdist eitt sindur kløkk, tá rætturin kom á borðið, men tá tey so góvu gætur hvussu genialt konseptið var, so var skjótt, at láturin rungaði í matstovini. Súpanin mettaði somikið væl, at tey flestu náddu ikki at meir enn lokið, men ein mátti líka klípa ein bita av »borðiskinum«.

Fitt av póllendingum eru í Føroyum, og vónandi verða boð eftir onkrum póllendingi at læra ein av okkara dugnaligu matstovukokkum at gera pólska veiðumanssúpan, tí tað er ein heilt serlig og øðrvísi uppliving, sum burdi blivið eitt hitt. Tað finnast íslendskar matstovur, ið hava serligu súpanina við tí serliga borðiskinum á matarskránni.



MYNDIR: HERI SIMONSEN

*Suppuborðiskurin var gjørdur av breyði, og tað var lokið eisini*

# INNIHALD


2 KLUMMA: **SPARA OG OYÐSLA**
2 MATUR: **ØÐRVÍSI POLSK SUPPA**
4 INTERVIEW: **TÓRSTEIN MADSEN**
8 FINNA BEST **BRUNDIN**
9 TIPS: **ENDURNÝGGJA SONGINA**
10 HEILSUSÍÐAN: **6 FRUKTIR UM DAGIN**
11 90 SEKUND: **ARNI ZACHARIASSEN**
12 TÁ KAPITALISMA **VERÐUR KASINOSPÆL**
14 TIL ARBEIÐIS: **FRÍÐA JACOBSEN**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 LIST: **VÍSARI INNAN, VAKRARI UTTAN**
22 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
23 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
24 VIKUMYNDIN: **RUSSISK MODELL**


## KLUMMAN



*Randi Jacobsen*

# Spara og oyðsla

Nú ikki stendur so væl til búskaparliga í landinum, noyðist tað almenna av álvara at spara. Hvør konta verður endavend fyri at finna nakrar krónur.

Dag og dagliga hoyra vit neyðarróp um avleiðingarnar av, hvat allar sparingarnar hava við sær av neyð og vesaldómi.

Støðan er alt annað enn góð í landinum. Tað vita vit.

Men tá tað er so, er forargiligt at síggja, hvussu tað almenna oyðslar á øðrum økjum.

Eg kann ikki lata vera við at forargast, tá ið eg síggi misbrúk av almennum bilum. Okkara bilum.

Hetta eru bæði bilar hjá landsstovnum og kommunum. At privatar fyritøkur lata starvsfólk sini brúka bilarnar privat, viðkemur ikki okkum.

Tað er ikki ókent, at almenn starvsfólk taka bilin við heim og brúka hann harvið til at koyra millum heim og arbeiði.

Heilt vanligt er eisini, at starvsfólk í almennum og kommunalum størvum brúka okkara bilar til at koyra hjúnarfelagin millum heim og arbeiði og koyra børn til og úr skúla.

Almennir bilar fara eftir arbeiðstíð og leygardag til handils at keypa mjólk og breyð, og teir koyra á møti, í føðingardagar og í brúdleyp.

Almennu bilarnir fara á útsølu og út at keypa jólagávur og føðingardagsgávur, og tú sær ofta almennar bilar í privatum ørindum fara so langt sum gjøgnum undirsjóartunlarnar.

Hvør rindar? Tú og eg.



TILVILDARLIG MYND

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Tórstein Madsen / Álvur Haraldsen